Janita selur Evropa í USA

6. mai í ár læt ein handil upp í amerikanska býnum Gloucester nevndur Touch of Europe. Aftanfyri nýggja klædnahandilin stendur føroyska Janita Vermundsdóttir Powell, og hon leggur seg serliga eftir at selja evropeiskar vørur í USA

Janita Vermundsdóttir Powell saman við manninum Frank

STEFAN Í SKORINI

Hetta er ikki ein handil, sum nógvir aðrir har um leiðir, ið selja klæðir. Hesin leggur dent á at hava eitt gott útboð av evropeiskum vørum, sum Janita heldur verða ein trotvøra har um leiðir.

- Tá eg kom yvir her at búgva fyrstu ferð, legði eg beinanvegin merki til, hvussu lítið útboðið av veruligum evropeiskum klædnavørum var. Tað var mest í amerikanskum sniði, og tað er ikki nóg gott, sigur Janita.

Føroyskt/Spanskt samstarv

Janita er ikki einsamøll um hesa nýggju verkætlanina. Yvonne Grim úr Spania er eisini partaeigari av handlinum, og tær reka hann saman. Eisini er tað fyri tað mesta tær báðar, sum standa aftanfyri diskin og taka ímóti Gloucester búgvum, sum fegnir vilja klæða seg í pløgg, framleidd í okkara heimsparti. Eisini hava tær tvey onnur starvsfólk, sum tó ikki eru fulla tíð.

Tá Janita flutti til Gloucester á øðrum sinni, men hesuferð við manni sínum, arbeiddi hon í eini vakurleikastovu í eini fjúrtan mánaðar, har hon mest fekst við at røkja negl hjá fólki. Á sama arbeiðsplássi arbeiddi eisini Yvonne sum massøsa.

Sum evropearar saknaðu tær ein part av teimum heimligu vørunum, og tí valdu tær at sláa seg saman og lata ein handil upp, sum serliga leggur seg eftir at selja evropeisk klæði. Av fyrstan tíð var ætlanin at gera eina café við navninum Taste og Europe, men tað gjørdist klæðir ístaðin. Ætlanin við café´ini eru tó ikki heilt lagdar til viks, men eitt ting í senn.

Tað liggur eisini í navninum, Touch of Europe, at hetta er ein handil, sum hevur ein serligan evropeiskan dám. Handilin er mitt í býnum og kundi tí ikki ligið betur fyri. Eitt høli er leigað í eini handilsmiðstøð, sum er í høvuðsgøtuni í Gloucester. Tá handilin lat upp, hevði eitt av lokalbløðunum har eisini eina grein um nýggja handilin.

Gongur væl

Í tær fýra mánaðirnar, sum handilin hevur verið opin, hevur tað gingið avbera væl. Janita sigur, at undirtøkan hevur verið sera góð og nógv betri, enn tær sjálvar høvdu torað at vóna frammanundan.

- Tað gongur sera væl við handlinum, og tað er heilt vist, at tørvur er á einum slíkum handli, sigur føroyska handilskvinnan í USA.

- Orsøkin, til at tað hevur gingið so væl í hond, er kanska tann, at flest fólk her hava djúpar røtur handan Atlantshavið, og tey hava framvegis ein evropeiskan samleika eftir, sjálvt um tad eru øldir síðani, at teirra ættfedrar settu búgv í hesum heimspartinum. Tí vilja tey eisini fegin hava hendur á klæðum og øðrum, sum er framleitt í Evropa, greiðir Janita frá.

Handilin hevur havt nógv viðskiftafólk, og longu nú leggja tey merki til, at nøkur teirra leggja leiðina framvið aftur Touch of Europe, eftir at tey hava verið har einaferð. Tó heldur Janita, at tad er nakað tíðliga at siga, hvussu tað fer ganga í longdini.

Tær hava lagt seg eftir at gera nakað øðrvísi enn allir hinir klædnahandlarnir, og tað vísir seg at virka væl. Janita greiðir frá, at útboðið av klæðum er ómetaliga stórt, men eingin hevur selur sovorðin klæðir, sum tær.

- Um viðskiftafólk skulu hava nakað øðrvísi, so skulu tey vita, júst hvar tey skulu leita, ella er tað næstan ógjørligt at finna fram til tað, man vil hava. Tá so fólk koma í okkara handil vita tey, at tey her kunnu ogna sær nakað heilt øðrvísi enn vanligu handlarnir selja, sigur Janita.

Sum nú er fáa tær mest danskar og spanskar vørur, tí tað er mest natúrligt hjá teimum at samstarva við framleiðarar úr hesum báðum londunum. Janita hevur eitt systkinabarn, sum arbeiðir í Klivanum í SMS, og haðani hevur hon fingið at vita, hvønn hon skal venda sær til í Danmark. Av frælsisstríðnum seinasti í 1700-talinum.

New England, sum fevnir um ein stóran part av eystur-strondini í USA, er framvegis tann mest evropeiski parturin av USA, men ikki nóg europeiskur til Janitu, og tað hevur hon eisini gjørt nakað við.

Hon flutti úr Føroyum sum 19 ára gomul fyrst í nítiárunum. Hon hevur tikið FHS á Handilsskúlanum í Havn og fór so niður til Danmarkar á hægri handilsskúla. Síðani fór hon í læru innan útflutning, og hon hevur arbeitt hjá Føroya Fiskavirking í Danmark, Týsklandi og USA. Har trúlovaðist hon við stjóranum á tí fyritøkuni, hon var í starvsvenjing hjá. Tey giftust í Keypmannahavn og fluttu aftur til Gloucester, har tey hava búð seinastu trý árini.

Hon eigur nú tveir dreingir saman við manninum Frank. Tann eldri er hálvtannað ára gamal og eitur Frank Junior eftir pápanum. Tann eldri eitur Andreas og er hálvttriðja ára gamal.

The Perfect Storm

Býurin Gloucester var karmur um kenda og væl umtókta filmin The Perfect Storm, har George Clooney hevði høvuðsleiklutin, sum skiparin, ið gekk burtur við skipi sínum í einum av ringasta ódnarveðrinum, sum hevur verið har um leiðir í nýggjari tíð.

Janita sigur, at nógv fleiri ferðafólk enn vanligt hava vitjað býin í summar, og tað er orsaka av filminum. Hetta hava tær eisini merkt í handlinum. Gloucester er ein legendariskur fiskibýur, og ein bók hjá kenda rithøvundanum Rudyard Kipling gongur eisini fyri seg á einum báti úr Gloucester.

Fyri Janitu Vermundsdóttir Powell hevur henda verkætlanin eydnast væl, og handil hennara við heimligu vørunum hjálpir eisini eitt sindur uppá heimlongsulin hjá teimum báðum útisetunum í Gloucester.

Norðoyingar eru seinastu dagarnar vælsignaðir við heilum trimum grindum

Siðirnir halda

Norðoyingar prógvaðu í seinastu grindini, at gomlu føroysku siðirnir at geva øðrum burturav eru varðveittir

JOHN JOHANNESSEN

Reportaga: Norðoyingar fingu so nógva grind hesa vikuna, at tað vóru ikki øll, ið hvødu pláss at goyma hesar vælsignaðu bitar.

Men einki skuldi burt av gávuni. Tí gløddu telefonlinjurnar úr Norðoyggjum inn á meginlandið allan hósdagin. Norðoyingar buðu skyldfólki og vinum at koma norður at fylla sær kaggarnar, so tey eisini kundu leska sær av hesum góðu bitum.

Hetta sást eisini á ferjuleguni í Leirvík seinnapartin. Har var ein øðilig rokan av fólkum, ið runnu aftur og fram við kaggum, baljum, plastiksekkjum og øðrum íløtum. Møguleikin at ogna sær eitt kók skuldi ikki fara fram við borðinum. Tað var sum í grind!

Biladekkið á Dúgvuni minti mest um eina bryggju, har menn júst eru lidnir at skera upp. Slipsaklæddu fundarmenninir, sum komu heim aftur úr Havn, máttu hyggja seg væl fyri og leypa millum mongu hyljarnar, fyri ikki at oyðileggja leðurskógvarnar og væl pressaðu brøkurnar av sniki og blóði.

Hinvegin runnu vásaklæddir meginlandsmenn í land við vognum, fyltum av kaggum, baljum og sekkjum at fylla í viðførisrúmið.

Fyri hvønn túrin hjá Dúgvuni gjørdist ferðaætlanin alt meira óreglulig. Grindin mátti og skuldi á- og avskipast. So mátti ferðaætlan vera ferðaætlan.

Í egningarskúrum í Klaksvík stríddust sveittandi menn við at fáa grindina til høldar. Og tá meginlandsmenn komu við kaggunum, var einki annað at gera, enn bert at standa og hyggja at, meðan kaggarnir vórðu fyltir. Kanska onnur hondin bleiv skitin...

Sjálvandi var eisini steðgur, meðan menn eftir gomlum siði fingu sær ein ráka.

Nóg mikið var ikki við meginlandsíløtunum.

– Eitt ílat afturat til tín og eitt til Velbastaðvegin og eitt til Eiðis. Jú, tit hava pláss!

Síðani aftur at rokast inn eftir biladekkinum á Dúgvuni. Nú var hon nógv seinkað. Og bilarøðin í Klaksvík rakk frá ferjuleguni og heilt norð til Solo. Summi sluppu ikki heim aftur tann dagin. Men hvat um tað, veitslurómur var.

– Hvør segði, tað var neyðugt at stjala sær grind? Nei, frægast mann vera at fáa hana erliga.

Manga takk!

Vásin var nógvur í Klaksvík hósdagin, tá menn fingu sær grind til høldar. Neyðugt var hjá handlunum at sýta fólki í snikutum skóm atgongd

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 30-04-98 Km.: 24.000
Prísur: 167.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 STW.
Skrás.: 01-06-92 Km.: 82.000
Prísur: 62.600,- Sjnaður 8/00

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli AUT. GEAR
Skrás.: 13-06-96 Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 STATION
Skrás.: 13-04-92 Km.: 110.000
Prísur: 57.600,- Sjnaður 2/99

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 03-04-96 Km.: 122.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA YARIS 1,0 TERRA
Skrás.: 07-05-99 Km.: 30.000
Prísur: 112.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA E 1,6 Xli
Skrás.: 30-01-96 Km.: 48.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA YARIS 1,0 TERRA
Skrás.: 21-04-99 Km.: 26.000
Prísur: 118.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA E 1,8 Gli
Skrás.: 28-06-95 Km.: 72.000
Prísur: 108.600,- Garanti* Sjnaður 12/99

VOLVO 460 SEDAN
Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000
Prísur: 48.600,- Sjnaður 6/99

TOYOTA CARINA E 2,0 GLi SEDAN
Skrás.: 17-08-92 Km.: 95.000
Prísur: 85.600,- Garanti*

HONDA CIVIC 1,4
Skrás.: 07-04-97 Km.: 52.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2.0 GLi Sjnaður 3/00
Skrás.: 02-07-90 Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-

FORD ESCORT 1,8 T-DIESEL STW.
Skrás.: 08-10-97 Km.: 24.000
Prísur: 132.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli L/B
Skrás.: 14-08-91 Km.: 69.000
Prísur: 72.600,- Garanti* Sjnaður 5/99

OPEL ASTRA 1,8 STATION
Skrás.: 09-11-95 Km.: 71.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 Xli
Skrás.: 27-07-92 Km.: 131.000
Prísur: 58.600,- Sjnaður 5/99

FORD ESCORT 1,8
Skrás.: 21-08-95 Km.: 81.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90 Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96 Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000
Prísur: 128.600,- Garanti**

KIA SEPHIA 1,5
Skrás.: 17-04-97 Km.: 59.000
Prísur: 68.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA
Skrás.: 16-03-98 Km.: 50.000
Prísur: 112.600,- Garanti**

VOLVO 240 GL AUT.
Skrás.: 04-06-86 Km.: 165.000
Prísur: 22.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA
Skrás.: 01-05-95 Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti* Sjnaður 12/99

VØRUVOGNAR

TOYOTA LANDCRUISER 4,0 TURBO
Skrás.: 20-10-88 Km.: 159.000
Prísur: 99.600,- Sjnaður 8/00

NISSAN PATROL 4x4
Skrás.: 01-07-89 Km.: 197.000
Prísur: 55.600,- Sjnaður 12/98

TOYOTA DYNA 150 V/LAST
Skrás.: 24-02-97 Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

FORD COURIER DIESEL
Skrás.: 22-05-94 Km.: 91.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL
Skrás.: 05-11-86 Km.: 230.000
Prísur: 48.600,-

VW TARO 4x4 PICK-UP
Skrás.: 05-11-91 Km.: 175.000
Prísur: 72.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Prísur: 39.600,-

AVHEINTINGARTILBOÐ

TOYOTA CARINA 1,6 XL SEDAN
Skrás.: 19-10-87 Km.: 175.000
Prísur: 7.000,- Sjnaður 10/98

FORD ESCORT
Skrás.: 14-03-88 Km.: 177.000
Prísur: 9.000,- Sjnaður 3/99

FORD SIERRA 1,6
Skrás.: 10-05-89 Km.: 110.000
Prísur: 15.000,- Sjnaður 3/00

FORD ESCORT
Skrás.: 18-06-87 Km.: 168.000
Prísur: 8.000,- Sjnaður 5/99

HONDA ACCORD
Skrás.: 09-04-87 Km.: 179.000
Prísur: 14.000,- Sjnaður 5/98

OPEL ASCONA 1,6
Skrás.: 01-01-87
Prísur: 3.000,-

NISSAN BLUEBIRD
Skrás.: 12-06-87 Km.: 157.000
Prísur: 12.000,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00

Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311828